# Fagnaðu Portugal

*Enskur fótbóltur hevur uttan iva nógv viðhaldsfólk í Føroyum, men onkustaðni var fagnaður stórur um portugisiska sigurin*

JÁKUP MØRK/
ÁLVUR HARALDSEN

Mongu leygardagarnir framman fyri sjónvarpsskíggajnum heima í stovuni, og síðani sunnudagar framman fyri tólið hjá vinfólki, sum síggja SkySports, hava uttan iva gjørt sítt til, at føroyingar hava lagt stóran als á enskan fótbólt.

Hetta hevur eisini rakt áhugan fyri enska landsliðnum, og tað er neyvan at taka munnin ov fullan, tá sagt verður, at meginparturin av hyggjarunum í Føroyum vónaðu at Ongland fór at vinna dystin móti Portugal Mánakvøldið.


*Uppi hjá skiparanum sótu teir spentir og bíaður, til seinasta bríkslið hevði ljóðað…*

**Ikki bert Ongland**

Tó so, undantøk eru í øllum reglum, og í øllum førum vóru nøkur portogisisk viðhaldsfólk á okkara leiðum mánakvøldið.

Stutt fyri dystarlok fóru vit báðir, myndamaðurin, umborð á porogisiska trolaran, Calvao, sum júst nú er at síggja við ískeiina.

Fyrst vóru teir umborð eitt sindur afturhaldandi, og spurdu, hvørji ørindi okkara vóru, men eftir at hava greitt teimum frá støðu okkara, vórðu vit bodnir inn av skiparanum, Francisco Pinho.

Um tað mundi restaðu einir fimm minuttir av dystinum, og einki var at taka seg aftur í, at lagið umborð var gott. Francisco viðgekk tó, at tað kendist einki serligt, tá Ongland eftir góðum korteri hevði lagt seg á odda 2-0.


*…Og fagnaðurin niðri í messuni var sjálvandi stórur, tá endaliga úrslitið var greitt*

**Broytt til tað betra**

Nú var tó vent í holuni, og teir umborð sótu ídnir og gjørdu sínar viðmerkingar til dystin, sum altsto endaði við portogisiskum 3-2 sigri.

Frøin var sjálvsagt stór, tá seinasta bríkslið ljóðaði, og Francisco, sum at byrja við vildi hava ørindi okkara at vita, var bæði blíður og týður, tá hann vísti okkum runt umborð á skipinum.

- Eitt sindur eldri enn tykkara fínu skip, segði, meðan hann peikaði móti nýggju Krúnborg, sum lá skamt har frá.

Yvirhøvur tóktist hann tó at lata væl at, men hann ásannaði tó, at tað kundi gerast ein trupulleiki at fylgja við komandi dystunum hjá heimlandinum, tí tá er Calvao langt úr landi skotin uttan møguleika fyri at síggja meira EM-fótbólt á hesum sinni.

*FM umdysturin:*

# Talvini

*Niðanfyri hava vit sett upp tey trý talvini, sum vórðu telvað á Hotel Hafnia í FM umdystinum í talvi*

**1)**
**Torbjørn Thomsen (2210)**
**Flóvin Tór Næs (2260)**

| | |
|---|---|
| 1.c4 c5 | 18.a3 a5 |
| 2.Ric3 Rif6 | 19.Kh1 b4 |
| 3.g3 g6 | 20.axb4 axb4 |
| 4.Bg2 Bg7 | 21.Rid1 Rib3 |
| 5.Rif3 d5 | 22.Ra4 Fb6 |
| 6.cxd5 Rixd5 | 23.Rie3 Ric5 |
| 7.0-0 0-0 | 24.Raa1 Rixd3 |
| 8.Rig5 e6 | 25.Rixd5 Bxd5 |
| 9.Rige4 c4 | 26.Bxd5 Rixf2+ |
| 10.d3 cxd3 | 27.Kg2 Rc2 |
| 11.exd3 Ric6 | 28.Bxf7+ Kxf7 |
| 12.Rixd5 exd5 | 29.Fxh7+ Kf6 |
| 13.Ric3 Be6 | 30.Fh4+ Kg7 |
| 14.Bf4 Rc8 | 31.Fe7+ Rf7 |
| 15.Fd2 Rid4 | 32.Fe5+ Ff6 |
| 16.Bh6 Bxh6 | 33.Fd5 Rd2 |
| 17.Fxh6 b5 | 0-1 |

**(2)**
**John Rødgaard (2335)**
**Torbjørn Thomsen (2210)**

| | |
|---|---|
| 1.c4 Rif6 | 22.e5 Rab8 |
| 2.Rif3 g6 | 23.Be4 Bxe4 |
| 3.Ric3 Bg7 | 24.Rxe4 Re6 |
| 4.e4 d6 | 25.Be1 Fb7 |
| 5.d4 0-0 | 26.Re2 Rib6 |
| 6.Be2 e5 | 27.exd6 Rxe2 |
| 7.Be3 exd4 | 28.Fxe2 cxd6 |
| 8.Rixd4 Re8 | 29.b3 Fd7 |
| 9.f3 Ric6 | 30.Fd3 Re8 |
| 10.Fd2 Rih5 | 31.Rib5 d5 |
| 11.Rixc6 bxc6 | 32.cxd5 c4 |
| 12.g4 Rif6 | 33.bxc4 Rixc4 |
| 13.h4 h5 | 34.Ric3 Rie3 |
| 14.g5 Rid7 | 35.Bd2 Rixd1 |
| 15.0-0-0 Bb7 | 36.Kxd1 Rd8 |
| 16.Bd4 Bf8 | 37.Kc2 Bxc3 |
| 17.Bf2 Bg7 | 38.Bxc3 Fxd5 |
| 18.Rhe1 c5 | 39.Fa6 Fd1+ |
| 19.Fc2 Bc6 | 40.Kb2 Rb8+ |
| 20.Bd3 Fb8 | 41.Ka3 Fc1+ |
| 21.f4 Fb4 | 0-1 |

**(3)**
**Flóvin Tór Næs (2260)**
**John Rødgaard (2335)**

| | |
|---|---|
| 1.d4 d5 | 30.f4 f5 |
| 2.c4 e6 | 31.Ff3 Fe7 |
| 3.Ric3 Rif6 | 32.Rg2 b5 |
| 4.Rif3 Be7 | 33.Rcc2 Rg4 |
| 5.cxd5 exd5 | 34.gxh4 Fxh4 |
| 6.Bg5 c6 | 35.Rxg4 fxg4 |
| 7.e3 Bf5 | 36.Fg3 Fh5 |
| 8.Bd3 Bxd3 | 37.Rg2 Rg6 |
| 9.Fxd3 Ribd7 | 38.h3 Ff5 |
| 10.0-0 0-0 | 39.hxg4 Fd3 |
| 11.Ff5 Re8 | 40.g5 Ff5 |
| 12.Rac1 Bd6 | 41.Fg4 Fxg4 |
| 13.Rfe1 Fb6 | 42.Rxg4 Re6 |
| 14.Bxf6 Rixf6 | 43.Kf2 Re8 |
| 15.Rc2 Re7 | 44.Rid2 a5 |
| 16.Rec1 Rae8 | 45.Rg1 Kf7 |
| 17.a3 Fd8 | 46.Rh1 a4 |
| 18.Rid2 Re6 | 47.Rif3 Ke6 |
| 19.Ria4 Rid7 | 48.Rie1 Kf5 |
| 20.g3 Rf6 | 49.Kf3 Ba5 |
| 21.Fg4 Rg6 | 50.Rid3 Bc3 |
| 22.Fh3 Rh6 | 51.Rh2 Rb8 |
| 23.Fg2 Rg6 | 52.Rc2 Ba5 |
| 24.b4 h5 | 53.Rie5 Rc8 |
| 25.Ric5 Rixc5 | 54.Rh2 Bc3 |
| 26.bxc5 Bc7 | 55.Rc2 Ba5 |
| 27.Rif3 Re4 | 56.Rh2 Bc3 |
| 28.Rid2 Ree6 | 57.Rc2 |
| 29.Rif1 h4 | Remis |

# Ávara ímóti smyrsli

*Bannaða Anders And smyrsli kann vea vandamikið*

í síðstu viku var Anders And blaðið tikið av hillunum, tí eingin vørulýsing var av einum pakka við smyrsli, sum fylgdi við blaðnum.

Smyrslið var ætlað børnunum, nú EM í fótbólt verður spælt í Belgia og Hollandi.

Tað óhefta Grøn Information sigur seg hava fingið at vita frá norskum myndugleikum, at krabbaelvandi og hormonórógvandi evni vóru í smyrslinum, sum fylgdi við Anders And blaðnum.

Eingi av evninum í smyrslinum eru ólóglig, men talan er um kemisk evni, sum verða mett sum ein vandi móti umhvørvinum, umframt at tey kunnu framkalla allergi.

Grøn Information mælir bæði børnum og vaksnum til at nýta smyrsl, sum verður nýtt á føstulávint og fæst í øllum leikuhandlum, um tey hava hug at mála seg í andlitinum, nú fótbóltsfeburin rættiliga ger um seg.

# Beckham í andgletti

*Manchester United stjørnan gav enskum áskoðarum fingurin*

JÁKUP MØRK

Aftur hevur rokn tikið seg upp um ensku fótbóltsstjørnuna, David Beckham.

**Gav fingurin**

Eftir 3-2 tapið móti Portugal, vóru fleiri enskir áskoðarar, FA vildi ikki kalla tey fyri viðhaldsfólk, sum róptu ókvæmisoð eftir ensku leikarunum, tá hesir vóru á veg út av vøllinum.

Hetta fekk sinnið í kók hjá Beckham, sum takkaði fyri við at geva áskoðarunum fingurin.

Ikki er líkt til, at Beckham fær nakra revsinf fyri tilburðin. UEFA sigur seg einki gera við málið, og hesu ferð er líkt til, at enska fólkið er í parti við Beckham, hóast fleiri av bløðunum hava eina aðra áskoðan um hetta.




# Klaksvíkar Sjómansskúli

Í august 2000 byrja hesi skeið:

## Skipskokkaskeið:





Útbúgvingin gevur øktan førleika at virka sum skipskokkur á føroyskum fiskiskipi.

Kokkaútbúgvingin leggur m.a. dent á, at næmingar læra føðslulæru og reinføri, at proviantera, matgerða og borðreiða. Í lærutíðini verða skeið tikin innan trygd og fyrstuhjálp.

Skeiðið varðar 20 vikur. Ongar upptøkutreytir eru til at sleppa inn.

Skeiðið, ið byrjar í august 2000 er fullteknað.

## Sjóvinnuflokkur:

Við hesum skeiði fæst atgongd til framhaldandi lestur til heimaskipara, um tygum eisini hava ta neyðugu siglingartíðina. Nærri upplýsingar hesum viðvíkjandi fáast við at venda sær til skúlan.

Møguleiki verðu eisini at taka dugnaskaparskeið í sigling, ið gevur rætt til at føra skip upp til 100 tons út á 30 fjóðringar úr landi.

Í lærutíðini verða skeið tikin innan trygd og fyrstuhjálp.

Skeiðið varðar 20 vikur. Tað eru ongar upptøkutreytir til at sleppa inn á kokkaskúlan.

Enn eru 2 pláss eftir á skeiðinum, ið byrjar í august 2000.



Umsóknarbløð fáast við at venda sær til skúlan tlf: 456128 fax: 457917 ella á telduposti: klaknav@klaknav.fo
Eisini kunnu tit vitja heimasíðu okkara: www.klaknav.fo

Sosialurin - 311820



# Pedagogur

## til Dagstovnin í Fuglafirði

Søkt verður eftir 3 pedagogum, 35 t. viku.

2 pedagogar at byrja 1.8.2000, ella skjótast tilber.
1 pedagog at byrja 1.9.200, ella skjótast tilber.
Størvini eru á stovu við 12 børnum í aldrinum 0–3 ár.

Lønin verður sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til leiðaran í dagstovninum tlf. 444940 / 225222.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu vera býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 26. juni kl. 10.00.

Býráðið skilar sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

Fuglafjørður, 9. juni 2000

**Fuglafjarðar býráð**



# Frá Suðurstreymoyar Sjálvstýrisfelag

1. uppstillingarfundur til býráðsvalið í Tórshavnar Kommunu verður mikudagin 14. juni kl. 19 á Landsbókasavninum.

**Suðurstreymoyar Sjálvstýrisfelag**



**KN tag**
**Det bedste over hovedet…**
**- også på Færøerne**

- Tagpapdækning
- Efterisolering med Rockwool
- Tagrenoveringer
- Tagreparationer
- Renovering af skiffertage

**Op til 15 års garanti**

Medlem af DTBs Garantifond

KN Tagdækning A/S

www.kn-tag.dk - E-mail: post@kn-tag.dk
Bredalsvigvej 1 • Humlum • 7600 Struer
**Tlf.** 0045 **97 86 17 33** •
Fax 0045 97 86 12 05
Kimsvej 1 • 7500 Holstebro
**Tlf.** 0045 **97 40 19 33**
Industrivej 15 • 7700 Thisted
**Tlf.** 0045 **97 92 61 33**
Ring og få et godt tilbud.

**Kontakt vore medarbejdere på taget hos Ide Møbler, Tórshavn, i juni og juli**



# Skipasmiðjan á Skála P/F

## søkir eftir leiðara til stáldeildina

**Starvið:**
Sum leiðari av stáldeildini á virkinum fær tú ábyrgdina av øllum fakstekniskum spurningum. Leiðarin verður partur av leiðsluni við tilvísing til tekniska leiðaran og stjóran. Leiðarin av stáldeildini skal saman við hinum deildarleiðarunum og leiðsluni annars, vera við til at menna virkið fakliga og tekniskt, styrkja verandi virksemi og troyta møguleikar fyri øktum virksemi. Leiðarin skal í samstarvi við onnur vera við til at samskipa arbeiði á skipasmiðjuni til gagns fyri bæði viðskiftafólk, starvsfólk og virkið sum heild.

Arbeiðsplássið er á Skála.

**Høvuðsuppgávur:**
- at skipa og leiða dagliga arbeiði á stáldeildini.
- at vera við til at leggja ætlanir fyri arbeiði, fylgja hesum upp og saman við leiðsluni annars samskipa ymisku arbeiðini frá byrjan til enda.
- at vera við til at mynda leiðsluna á virkinum bæði dagliga og við framtíðini í huga.
- at vera sjakformonnum, starvsfólki, viðskiftafólki o.ø. til hjálpar í fakstekniskum spurningum.
- at vera við í tilboðsrokning og gera metingar av arbeiðum sum heild, bæði fíggjarliga og hvat viðvíkur tíð.

**Førleikar:**
Vit rokna við at tú:
- er skipsverkfrøðingur, skipsbyggjari ella hevur líknandi útbúgving.
- hevur royndir innan stál- og skipasmíð.
- hevur leiðsluroyndir sum formaður ella líknandi og dugir at skipa og leiða arbeiði.
- hevur góð samskiftis- og samstarvsevnir.
- hevur evnir at greina sundur fakligar spurningar, viðgerða møguleikar saman við øðrum, taka avgerðir og seta hesar í verk.

**Vit bjóða:**
Eitt sjálvstøðugt arbeiði í einum spennandi umhvørvi við góðum møguleikum fyri fakligari og persónligari menning.
Løn, trygging og eftirløn eftir nærri avtalu partanna millum.

Um hetta hevur tín áhuga ella um tú hevur spurningar hesum viðvíkjandi, vinarliga set teg í samband við okkum á tlf. 44 11 55.

Starvið skal setast skjótast gjørligt.
Skrivlig umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til:

Skipasmiðjuna á Skála P/F
att.: Jón Danielsen
FO-480 Skála.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og freistin at lata inn er 21. juni 2000.

SKIPASMIÐJAN Á SKÁLA

www.faroeyard.fo
skala@faroeyard.fo

P/f Skipasmiðjan á Skála er dóttirfelag hjá P/f Tórshavnar Skipasmiðju. 75 fólk starvast á Skipasmiðjuni, sum í løtuni hevur sáttmála við Føroya Landsstýri um nýggja Sandoyarferju, ið skal latast um ársskiftið.